# kara fiskiskapi




*– Av tí, at plankton hevur alstóran týdning fyri liviumstøðurnar hjá fiski og fugli, leggur Fiskirannsóknarstovan stóra orku í at kanna gróður og nøgdir av plankton og møguligar orsøkir til broytingar, sigur Eilif Gaard, lívfrøðingur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

føðigrundarlagið undir øllum djóralívinum í sjónum. Av tí, at plantuplankton fær orkuna úr sólarljósinum, er gróðurin næstan bert í ovastu 50-100 metrunum av sjónum. Longri niðri er oftast myrkt.

Lívfrøðingurin greiðir frá, at næsti liður í føðiketuni er djóraplankton, sum oftast eru smá krabbadjór – ella í høvuðsheitum vatnloppur, ið eru umleið 1-3 millimetrar stórar.

– Tað kunnu eisini vera nakað størri verur av djóraplankton í sjónum, og tá er oftast talan um ein hóp, ið nevnist krill ella ljóskrabbi. Hesi krabbadjór eta plantuplankton og eru sjálvi av alstórum týdningi sum føði hjá fiski.

### Stóran týdning

Hann sigur, at plantuplanktonið, sum ikki verður etið uppi í sjónum, søkkur niður á botn, har tað er føði hjá botndjórum.

– Av tí, at plankton hevur alstóran týdning fyri liviumstøðurnar hjá størru djórunum, eisini fiski, leggur Fiskirannsóknarstovan stóra orku í at kanna gróður og nøgdir av plankton og møguligar orsøkir til broytingar í stað og tíð. Eisini verður kannað, hvussu ymiska planktonið ávirkar fisk. Hetta arbeiðið verður gjørt bæði á víðum havi og á landgrunninum.

Eilif Gaard vísir á, at plantonvøkstur á landgrunninum er grundarlagið undir allari framleiðslu av fiski á landgrunninum.

– Hendan framleiðslan av plankton er sera ymisk ár undan ári, og hetta merkist týðiliga aftur í tilgongd og vøkstri av fiski, eins og sjófugli. Tí verður nógv arbeiði lagt í at fylgja við hesum broytingum – og at skilja, hví árini eru so ymisk.

### Fjarðakanningar

Í frágreiðingini hjá Eilifi Gaard, sum vit hava hugt at, greiðir lívfrøðingurin eisini frá fjarðakanningum.

– Firðirnir vórðu kannaðir eina ferð í 2004. Kanningar vóru á Kaldbaksfirði, Skálafirði, Funningsfirði og í Sundalagnum. Endamálið var serliga at kanna ávirkan frá lívrunnum tilfari á oxygeninnihaldið í sjónum og á viðurskiftini á botni.

Hesar kanningar vórðu gjørdar í samstarvi við Biofar Royndarstøðina í Kaldbak.

– Á Skálafirði var heilt lítið av oxygeni í djúpu pørtunum av fjørðinum. Allastaðni djúpari enn 50 metrar var oxygeninnihaldið minni enn 1 mg/l, og niðri við botnin kom nøgdin niður á 0,5 mg/l. Á hinum firðunum var nógv av oxygeni á øllum dýpum, sigur Eilif Gaard í frágreiðingini um plankton.




*Í hesum bygningi í Mykinesgøtu letur KJ nú upp søludeild við goymslu*

# KJ Hydraulik eisini í Havn

**Í sambandi við, at KJ Hydraulik hevur keypt fyritøkuna, Norð Trukk í Havn, letur felagið upp søludeild við goymslu í Mykinesgøtu**

NÝGGJ SØLUDEILD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fríggjadagin millum klokkan 15 og 18 bjóða KJ Hydraulik og KJ Norð Trukk til móttøku í Mykinesgøtu 5 í Havn.

Móttøkan verður fyriskipað í sambandi við, at KJ- Hydraulikk hevur keypt fyritøkuna, Norð Trukk, sum hevur húsast í Mykinesgøtu 3 í Havn.

Nú KJ hevur keypt Norð Trukk, letur felagið eisini upp søludeild við goymslu, og hesin parturin av virkseminum verður í Mykinesgøtu 5 í Havn.

Soleiðis húsast KJ nú bæði í Mykinesgøtu 3 og Mykinesgøtu 5.

– Søludeildin og goymslan í Havn verður ein forlongdur armur av KJ á Kambsdali, og vit fara eitt nú at bjóða út hydraulikslangur, rør og fittings, filtur, hydraulikpumpur, ventilar og motorar, sigur felagið.

### Somu starvsfólk

Norð Trukk, sum nú kallast KJ Norð Trukk, hevur í mong ár verið ein leiðandi fyritøka í Føroyum innan sølu og tænastu av trukkum og lyftiútgerð.

– Eftir 27 ár í fyritøkuni hava Elsebeth og Erlind Magnussen gjørt av at selja Norð Trukk til KJ Hydraulik, siga KJ Hydraulik og KJ Norð Trukk í tíðindaskrivi.

Starvsfólkini á Norð Trukk halda fyribils fram hjá nýggju eigarunum.

### Áhugaverd fyritøka

KJ Norð Trukk kemur at halda fram við sama virksemi, sum higartil.

– Vit meta fyritøkuna at vera sera áhugaverda at byggja víðari á, siga nýggju eigararnir.

Nýggjur verkstaðsleiðari verður Petur Klein, og Erlind Magnussen heldur fram sum sølumaður.



*Ólavur Asafsson Olsen er stjóri í KJ Hydraulik*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*